LM-017/2020

Annika Petersen

Fra:	Jóhan Troest Davidsen
Sendt:	30. januar 2020 15:43
Til:	Annika Petersen
Cc:	Sørin Pram Sørensen; Pól Edvard Egholm
Emne:	SV: Uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin) til hoyringar
Vedhæftede filer:	Viðmerkingar til uppskot til hvítvasklóg.pdf; SF rættingar - Uppskot til løgtingslóg um fyribyrging av hvítvasking og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin).docx

Til Umhvørvis- og vinnumálaráðið UVMR

Vegna Skráseting Føroya verður við hesum viðheft:

1. Viðmerkingar til uppskot til hvítvasklóg
2. Uppskot til hvítvasklóg – við konsekvensrættingum og øðrum rættingum. Rættingarnar eru markeraðar í skjalinum, soleiðis, at tað ber til hjá UVMR ávikavist at góðkenna ella avvísa rættingarnar.

Blíðar heilsanir / Kind regards

Jóhan T. Davidsen

Fulltrúi

Skráseting Føroya

Skálatrøð 20
P.O. Box 73
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Telefonnummar: +298 358000

Fra: Annika Petersen <AnnikaHenrikkaHannaP@uvmr.fo>
Sendt: 8. januar 2020 19:02
Til: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; dat@dat.fo; Tryggingareftirlitið <tryggingareftirlitid@tryggingareftirlitid.fo>; Skráseting <skr@skraseting.fo>; Vinnuhúsið <industry@industry.fo>; petersen@adv.fo; pensjon@betri.fo; liv@liv.fo; kundi@banknordik.fo; fafelag@fafelag.fo; handverk@handverk.fo; heim@betri.fo; meklarin@meklarin.fo; skyn@skyn.fo; Landsbanki Føroya <landsbankin@landsbankin.fo>
Cc: Sørin Pram Sørensen <SorinPramS@uvmr.fo>; Pól Edvard Egholm <pole@uvmr.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin) til hoyringar

Til hoyringarpartarnar.

Viðhefta uppskot til løgtingslóg um fyribyrging av hvítvasking og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin) verður hervið sent tykkum til hoyringar.
Hoyringarfreistin er sett til **hósdagin 30. januar 2020.**

Vinaliga sendið møguligar viðmerkingar til uvmr@uvmr.fo

Vinaliga váttið fyri móttøku.

Blíðar heilsanir
Annika Petersen
Umhvørvis- og vinnumálaráðið.

Skráseting Føroya

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk móti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi

Generellar viðmerkingar

Viðmerkingarnar taka serstakliga støði í teimum ásetingum, sum hoyra til eftirlitsøkið hjá Skráseting Føroya. Kortini eru ávísar aðrar rættingar við. Víst verður eisini til hjálagda skjal við konsekvensrættingum og málsligum rættingum, settar inn í sjálvt lógaruppskotið.

Viðmerkingar til serstakar ásetingar

- § 1, stk. 1, nr. 8: henda áseting eigur av røttum at vísa til "nr. 6-7" (grannskoðarar og ognarmeklarar), og ikki til nr. 5, sum fevnir fíggjarligt virksemi sbr. nr. 1-4 hjá deildum hjá útlendskum fyritøkum.

- § 1, stk. 1, nr. 8: vantar eina tilvísing til § 1, stk. 1, nr. 14 í hvítvaskfyriskipanini (advokatar).

- § 1, stk. 1, nr. 10: í viðmerkingunum á s. 48 í uppskotinum til § 1 stendur, at útbjóðarar av spælitænastu eru undir eftirliti av landsstýrismanninum. Átti eftirlitsmyndugleikin ikki at framgingið av lógini? Í Danmark er Spillemyndigheden eftirlitsmyndugleiki. Í donsku hvítvasklógini eru ásetingar viðv. "Spillemyndigheden" frá §§ 65-69 a.

- § 2, nr. 9, litra b: er ásetingin í trá við tað, sum Global Forum ynskir?

- § 26, stk. 1: eigur av røttum at vísa til § 1, stk. 1, nr. 6 (ikki nr. 7).

- § 35, stk. 6: skotið verður upp at tillaga ásetingina soleiðis, at víst verður til § 1, stk. 1, nr. 1-6 og 8 (ikki til nr. 1-12). Við hesum verða ognarmeklarar, ognarmeklarafyritøkur, útbjóðarar av tænastuveitingum og útbjóðarar av spælitænastum undantiknar frá rættinum at útveksla upplýsingar eftir ásetingini. Hetta er í tráð við § 38, stk. 6 í donsku hvítvasklógini.

- § 40: í tráð við donsku hvítvasklógina, eigur ikki at vísa til § 1, stk. 1, nr. 6, við tað at talan er um slag av virksemi (grannskoðarar og grannskoðanarfyritøkur), sum Skráseting Føroya hevur eftirlit við (ásetingin er undir yvirskriftini "Tryggingareftirlitið").

- § 42, stk. 1, 1. pkt.: eigur at vísa til "*§ 36, stk. 1 og 2, ella § 38*" í tráð við donsku hvítvasklógina og hvítvaskfyriskipanina.

- § 42, stk. 1, 2. pkt.: um tað verður gjørt í tráð við donsku hvítvasklógina og hvítvaskfyriskipanina, eigur at vera víst til "*§ 36, stk. 2*".

- § 42: hevur eitt stk. 6 uttan nakran tekst. Skal stk. 6 strikast, ella er meiningin at hava stk. 6.

- § 43, stk. 3, nr. 2: tað eigur at vera víst til *".. samstarvsbólki eftir § 54."* (ikki § 55)

- § 45, stk. 4: tað er neyvan rætt at vísa til stk. 2, nr. 1, við tað at stk. 2 ikki er uppdeild í nummur. Hartil vantar ein tilvísing til stk. 3, nr. 1.

- § 48: ásett er í § 3, stk. 2 í kunngerð um alment talgilt kunngerablað, at fyritreytin fyri upptøku í Kunngerðablaðið av kunngerðum frá øðrum almennum stovnum enn landsstýrinum, er, at lýsing í Kunngerðablaðnum er ásett í viðkomandi løgtingslóg ella við heimild í løgtingslóg. Av hesi orsøk eigur at verða ásett, evt. í einum nýggjum stk. 2, at "*Kunngerðir, sum Skráseting Føroya ger sambært hesi løgtingslóg, skulu lýsast í Kunngerðablaðnum.*"

- § 49, stk. 1: víst eigur at vera til "*§§ 44, stk. 1 og 47*" (Ikki §§ 45, stk. 1 og 48).

- § 51, stk. 1: setningurin "*.. og til og frá Skráseting Føroya..*" eigur at setast inn.

- § 57, stk. 1: talan eigur at vera um "*brot á ... § 20, stk. 1, 2. pkt.*" (og ikki 1. pkt), sbr. donsku hvítvasklógina (ið vísir til § 21, stk. 1, 2. pkt.). Hartil eigur at verða víst til "brot á … §§ 29-30" (og ikki §§ 39-30).

- § 57, stk. 1, 2. pkt., vantar setningurin ".., verður revsað við bót."

- § 60: tað vantar at seta eitt nýtt 2. pkt. inn, sum er soljóðandi: "*... Samstundis fer úr gildi logtingslóg nr. 56 frá 9. juni 2008 um fyribyrgjandi tiltok ímóti hvítvaski av vinningi og figging av yvirgangi.*"

- §60: eigur at verða umhugsað, hvørt løgtingslógin annars skal hava skiftisreglur

Viðmerkingar til viðmerkingarnar til lógaruppskotið:

- Á s. 27 stendur, at: "*Nýggja hvítvaskfyriskipanin setur hvítvaskfyriskipanina frá 2010 úr gildi fyri fyritøkur og persónar, fevnd av hvítvaskfyriskipanini*". Hetta er ikki rætt. Av misgáum setur nýggja hvítvaskfyriskipanin fyriskipan nr. 626 af 27. juni 2008 úr gildi. Hetta merkir at hvítvaskfyriskipan frá 2010 framvegis er í gildi. Sostatt er bæði hvítvaskfyriskipanin frá 2019 og hvítvaskfyriskipanin frá 2010 í gildi. Talan er ivaleyst um ein redaktionellan feil.

- Á s. 32 stendur hesin setningur: "*Samstundis verður skotið upp, at í førum, har tað ikki er ein veruligur eigari, skal dagliga leiðslan skrásetast sum veruligur eigari.*" Er hetta í trá við tað, sum Global Forum ynskir?

- s. 32 eigur at verða víst til "*§ 2, nr. 4, litra a og b*" (ikki § 2, nr. 2, lita…)

- s. 37 framgongur hesin danski setningurin: "*Samtidig fastsætter 4. hvidvaskdirektiv, at de skærpede procedurer i forhold til politisk eksponerede personer yderligere skal varetages i forhold til en reel ejer, en begunstiget i henhold til en livsforsikringspolice og en begunstigedes reelle ejer.*" Støða má takast til, um hetta skal umsetast ella strikast.

- s. 37: víst eigur at vera til "*skjal 1*" viðv. avmarkaðum váða (ikki skjal 2).

- á s. 43 stendur hendan yvirskriftin: "*1.5. Ummæli og ummælisskjal*". Hetta er neyvan meiningin?

- Undir fíggjarligar avtalur á s. 43 er ein danskur tekstur, sum helst skal strikast.

- Rættingar á s. 45:
  - "*§ 51, § 54, stk. 1, ella §§ 60 ella 66*" eigur at verða broytt til "*§ 38, § 41, stk. 1, ella § 47*".
  - "*§ 49, stk. 1 og 4*" eigur at verða broytt til "*§ 37, stk. 1 og 4*".
  - "*sbr. § 60 í uppskotinum*" eigur at verða broytt til "*sbr. § 59, stk. 1 í uppskotinum*".
  - "*§ 58, stk. 5 og 7*" eigur at verða broytt til "*§ 45, stk. 5 og 7*".
  - "*sbr. § 60, stk. 2 í uppskotinum*" eigur at verða broytt til "*sbr. § 59, stk. 2 í uppskotinum*".

- Tað kann nevnast á s. 46 undir punkti 2.14, at Skráseting Føroya fær heimild til at áseta nærri reglur í § 48 í uppskotinum.

- Á s. 46 undir pkt. 2.15 vantar hesum teksturin ".. *Tryggingareftirlitinum ásetta freist.*" Harumframt manglar at verða nevnt, at Skráseting Føroya eisini hevur líknandi heimild um atgongd til fyritøkur og persónar í § 46 í uppskotinum.

- Á s. 47 undir viðmerkingar til § 1 vantar ein tilvísing til § 1, stk. 4 í uppskotinum.

- Niðarlaga á s. 47 stendur: "*Stk. 1, nr. 10 fevnir um tey, sum bjóða út spøl, ið eru undir eftirliti landsstýrismanins.*" Tað er einki ásett í sjálva lógina um, at tey, ið bjóða út spøl, eru undir eftirliti landsstýrismansins. Hetta verður viðmælt gjørt.

- Á s. 50: í staðin fyri at skriva "*tey, ið bjóða fyritøkum tænastur*", eigur heldur at verða skriva "*útbjóðarar av tænastuveitingum til fyritøkur*", so at tað er í tráð við allýsingina av heitinum í sjálvum lógartekstinum.

- Á s. 69 til § 51: vantar at setast inn ".. *og til og frá Skráseting Føroya..*".

- Á s. 70-71 vanta tilvísingar til §§.

Skráseting Føroya, tann 30-01-2020

Jógvan Thomsen
Stjóri

Jóhan T. Davidsen, fulltrúi